## Janne Ahonen fer aftur á skíðurnar

Í fyrradagin boðaði 32 ára gamli finnin, Janne Ahonen, frá alment, at hann fer at gera »come-back« í skíðlopi um einar tvær vikur, eftir at hann annars í fjør legði frá sær. – Byrji eg ikki aftur, fari eg at iðra meg um tað restina av lívinum, sigur Ahonen, sum millum annað hevur vunnið trý HM-gull, tvey OL-silvur umframt samanløgdu World Cup-kappingina.



## Andreas Müller sekkin í Schalke

Skeivar spælaraíløgur, ófriður í hópinum og vantandi úrslit hava nú fingið ta avleiðing í Schalke 04, at felagið hevur givið venjaranum, Andreas Müller, sekkin. Hann hevur leingi ikki sitið so væl um sátt við leiðsluna í felagnum, sum nú valdi at taka stigið fult út og koyra hann úr starvinum, eftir at mesta rumblið annars hevur verið í fjølmiðlunum.

# Kann fara nógvar vegir

**Nú bara tveir dystir eru eftir í Eikliguni hjá kvinnum, ber framvegis til, at silvur- og bronsuheiðursmerkini kunnu fara ymsar vegir.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í fleiri vikur hevur staðið púra opið, hvar silvur- og bronsuheiðursmerkini hjá flogbóltskvinnunum skulu fara, og ikki færri enn fýra feløg hava verið um boðið. Bara tveir dystir eru eftir, Fleyr-ÍF og SÍ-Dráttur, og so kunnu fólk annars hyggja at støðuni og spæla sær við støddfrøðini…

SÍ situr í Sørvági og bíðar eftir at fáa gullmerkini, men annars sita øll hini, uttan KÍF og TB, og bíða eftir avgerandi løtuni leygardagin, tá endaliga stigatalvan opinberar seg. Nógv meira spennandi fær tað ikki verið – og tað einasta, ið kundi yvirhálað hetta, hevði sjálvandi verið, um gullið eisini stóð upp á spæl. Men til tað hava SÍ-kvinnurnar snøgt sagt verið ov góðar.

Leygardagin vóru tveir dystir í Eikliguni hjá kvinnum. Á Giljanesi tók Dráttur ímóti TB, sum ikki hevur fingið tað nógva at bera til í vetur, tí har er einki stig komið til høldar – og tað kom tað heldur ikki, nú TB spældi sínar tveir síðstu dystir um vikuskiftið.



*TB-kvinnurnar royna at blokka smasjinum frá Annu Müller Jacobsen hjá Mjølni í dystinum í Trongisvági sunnudagin*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Dráttur vann tey bæði fyrstu settini stórt, 25-13 og 25-9, men so kom stígur í og TB svaraði væl aftur við at vinna triðja sett 26-24. At TB-kvinnurnar vildu stríðast fyri sakini og fáa sum mest burturúr, vístu tær eisini í fjórða setti, ið gjørdist næstan líka tætt sum triðja, tí tað endaði 25-23, og so vann Dráttur kortini dystin 3-1.

### Favorittsigrar

Hin dysturin leygardagin var á Kambsdali, har ÍF tók ímóti KÍF, sum ferð eftir ferð hevur roynt at spælt teimum ovaru liðunum puss. KÍF hevur millum annað vunnið á greipuvinnarunum úr SÍ, umframt at tað herfyri eydnaðist at fáa ein fimmsettara ímóti Drátti.

Men ímóti ÍF bar ikki so væl til hjá kollfjarðarkvinnum, sum máttu lúta 3-1. ÍF byrjaði væl og vann 25-17 og 25-22 í teimum báðum fyrstu settunum, men so gjørdi KÍF ein vørr og vann triðja sett 27-25. Hetta vísti seg tó bert at vera ein einstakur vørrur, tí í triðja setti vant ÍF burtur úr KÍF og gjørdi slætt borð, 25-13.

Triði kvinnudysturin var í Trongisvági, har TB hevði vitjan av Mjølni, ið er einasta av teimum fýra næstfremstu, ið bara kann vinna bronsu – men eisini kann enda við ongum. Her var talan um ein javnan dyst, burtur sæð frá øðrum setti, tá Mjølnir var nógv betri.

Mjølnir vann fyrsta sett 25-21 og so heili 25-12 í øðrum setti, áðrenn TB svaraði aftur við at vinna 26-24 í triðja setti. Her kom TB væl afturíaftur, tí Mjølnir var á odda 23-18, áðrenn TB kom upp á javnt, 23-23, fyri síðani at taka settið. Í fjórða setti rakk TB ikki so langt, og Mjølnir vann tað 25-21.

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 17 | 15 | - | 2 | 48 | 22 | 26 | 19 |
| 2 | Mjølnir | 18 | 11 | - | 7 | 41 | 31 | 10 | 14 |
| 3 | ÍF | 17 | 10 | - | 7 | 36 | 27 | 9 | 14 |
| 4 | Fleyr | 17 | 10 | - | 7 | 37 | 28 | 9 | 13 |
| 5 | Dráttur | 17 | 10 | - | 7 | 39 | 31 | 8 | 13 |
| 6 | KÍF | 18 | 5 | - | 13 | 30 | 44 | -14 | 7 |
| 7 | TB | 18 | 0 | - | 18 | 6 | 54 | -48 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 12 | 10 | - | 2 | 33 | 15 | 18 | 15 |
| 2 | SÍ | 12 | 7 | - | 5 | 27 | 22 | 5 | 10 |
| 3 | Mjølnir | 12 | 3 | - | 9 | 17 | 32 | -15 | 6 |
| 4 | Fleyr | 12 | 4 | - | 8 | 19 | 27 | -8 | 5 |

## Menninir lidnir

**Longu undan seinasta umfari í Eikliguni hjá monnum var alt avgjørt, so hesir dystirnir skuldu bara fáast frá hondini.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Úrslitini leygardagin hjá monnunum fingu bara kosmetiskan týdning fyri endaligu støðuna, og tað ber helst eisini til at siga, at talan júst var um kosmetikk. Í øllum førum endaðu báðir dystirnir við, at lægru liðini megnaðu at vinna á teimum hægru.

SÍ fekk eitt slag av uppreisn frá steypafinaluni, tá tað í Sørvági eydnaðist at vinna 3-1 á greipuvinnarunum úr ÍF. SÍ vann tey bæði fyrstu settini, ið vóru rímiliga jøvn, 25-23 og 25-21, men so vísti ÍF nakað av tí, ið hevur givið hópin av steypum og heiðursmerkjum í vetur, tí triðja sett vunn fuglfirðingar 25-9! Men í fjórða setti var SÍ aftur upp á pláss og vann 25-22.

Hin dysturin var í Klaksvík millum Mjølnir og Fleyr, og her eydnaðist Fleyr, sum er einasta av teimum fýra liðunum, ið einki heiðursmerki fær, at vinna 3-1. Mjølnir vann fyrsta setti 25-19, men so vendi Fleyr dystinum og tók trý tey síðstu settini og sigurin: 25-27, 22-25 og 24-26.

# Sólvá og Svedala komu í endapælið



*Sólvá Dimon var sunnudagin næstbesti stigavinnarin hjá Svedala Volley, tá liðið vann seg víðari úr grundspælinum og nú skal spæla fjórðingsfinalur*

**Tá Sólvá Dimon í januar gjørdi sáttmála við svenska flogbóltsfelagið Svedala Volley, var endamálið hjá felagnum at tryggja sær pláss í endaspælinum. Tað eydnaðist sunnudagin.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sunnudagin vann Svedala Volley 3-2 á RIG Falköping, og tað var júst nóg mikið til at sleppa upp um strikuna og at sleppa við til endaspælið í bestu svensku flogbóltsdeildini.

Kravið undan hesum dystinum var, at Svedala á heimavølli skuldi vinna tvey sett, og tað eydnaðist til fulnar – ikki minst við góðum spæli frá Sólvá Dimon.

Hon var við eini úrtøku upp á 14 stig næstbesti spælarin á liðnum, saman við einari aðrari. Heili 12 av stigunum vann hon liðnum í álopsspælinum, umframt at hon vann Svedala eitt stig við servu og eitt við blokki.

Við sigrinum endaði Svedala trý stig framman fyri mótstøðuliðið sunnudagin, og við einum áttandaplássi var tað akkurát nóg mikið til at koma í fjórðingsfinalurnar í endaspælinum.

Fjórðingsfinalurnar fevna um fimm dystir ímóti Engelholm, sum hevur verið nógv tað besta liðið í vetur við 50 stigum. Liðið hevur vunnið 17 dystir og bara tapt ein, so óivað fáa Sólvá og tær nú sína sak fyri.

Men tær eru í endaspælinum, og harvið hevur Sólvá verið við til at givið liðnum tað, venjarin vónaði, tá sáttmáli var gjørdur við hana. Sáttmálin er fyribils galdandi til endan á hesum kappingarárinum.